

# Sunnudagsdøgurði

*Forrættur:*
Rómalegerað aspargessúpan við heimabakaðum breyði

*Døgurða:*
Heilstokt lambstjógv v/ hvítleyksauté, rómasós og eplum

*Omaná:*
Úrval av ymiskum kakum

kr. 210,-
kl. 12.00-16.00

*Vit hava bygt um ...*
*Kom og vitja okkum !*

Hotel Norð

Eggjarvegur 1 · Viðareiði · tlf. 45 12 44 · www.hotelnord.fo

creð 458006

Gjaldstovan hevur um hendi Landsrokn-skapin, Búskaparskipan landsins, og ein stóran part av almenna bókhaldinum.

Á Gjaldstovuni arbeiða 32 fólk.

Kjarnin í Búskaparskipan landsins er Oracle E-business suite. Av øðrum skipanum kunnu verða nevndar:
- Felags lønarskipan
- Búskettskipan
- Leiðslukunningarskipan
- Dátuvøruhús.

Í kreditorabókhaldinum verða rokningar til tað almenna ljóslisnar (skannaðar) og neyðugar skrásetingar verða framdar. Síðan verða rokningarnar sendar víðari í eini verkgongdarskipan elektróniskt til teir ymsu almennu stovnarnar. Kreditorarbókhaldið hevur um hendi umsitingina av øllum rokningarflowinum, t.e. at yvirvakja og alla verkgongdina frá móttøku til goldið verður. Í hesum liggur t.d. at gera feilrættingar og at kanna, hví rokningar ikki verða avgreiddar. Kreditorabókhaldið hevur eisini um hendi at svara fyrispurningum og at testa broytingar í skipanini. Í løtuni eru einir 300-400 brúkarar av rokningarverk-gongdarskipanini.

Arbeitt verður í løtuni við, at tað almenna skal hava rokningar elektróniskt.

Talan er um góðar arbeiðsum-støður, bæði tá ið ræður um høli og útbúnað. Gjaldstovan arbeiðir við førleikamenning, hevur eina flekstíðarskipan, og í Fíggjar-málaráðnum eru góð kantinuviður-skifti.

www.gjaldstovan.fo

# 2 spennandi størv



**Hevur tú prógv av studentaskúla ella handilsskúla í summar, hava vit eitt starv til tín.**

Starvið hóskar sera væl, ætlar tú at steðga á í eitt ella tvey ár, áðrenn tú fert undir útbúgving.

**Arbeiðsuppgávurnar eru í høvuðsheitum:**
- skanna rokningar
- skráseta grundardátur
- skráseta útlendsk gjaldoyru
- skráseta afturvendandi rokningar
- skráseta í høvuðsbókhaldi
- avgreiða fyrispurningar m.a. um útgjaldingar
- leita fram skjøl og arkivera
- feilrættingar

Gjaldstovan kann bjóða eitt spennandi arbeiðsumhvørvi, har fakliga stigið er í støðugum framburði, og har tað verða brúkt framkomin EDV-amboð.

**Setanarviðurskifti:**
Arbeiðstíðirnar eru 39 tímar um vikuna, og starvið er lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvs-mannafelagið í bólki II. Kundi tú hugsað tær at fingið meiri at vita um starvið, ert tú vælkomin at venda tær til Onnu Højgaard, telefon 35 24 46.

**Umsókn:**
Umsóknarfreistin er 2. juli 2007.
Umsóknir við prógvum og møguliga viðmælum skulu sendast til: Føroya Gjaldstovu, Traðagøta 39, Boks 2009, 165 Argir.

**Møguleiki er fyri at byrja so skjótt sum til ber.**

DIMMALÆTTING 341200

# nordbil & nordcar

## Goymslufólk og goymslulærlingur

Til goymslu okkara, ið tryggjar eykalutir og veitingar til Honda, Hyundai, Skoda, BMW, Fiat og MiniCooper, sóknast vit eftir einum goymslufólki og einum goymslulærlingi.

Fyri læruplássið er galdandi, at viðkomandi skal hava lokið FHS ella HH prógv. Lærusáttmáli og løn verður sambært galdandi treytir ásett av mentamálaráðnum.

Lærutíðin er 3 ár um mann hevur FHS prógv, og 2 ár, um mann hevur HH.

Fyri goymslufólkið er galdandi, at vit ynskja okkum ein starvsfelaga, ið helst hevur royndir innan goymslustýring og hartilhoyrandi skipanir. Løn verður latin eftir nærri avtalu

Vit ímynda okkum at nýggju starvsfelagar okkara eru álítandi og nærlagdir. Tað er umráðandi, at hugburðurin til tænastuveitingar er á einum høgum støði, og at lyndið er lætt til stundum krevjandi uppgávur.

Meira kunning um størvini fæst frá Birgir Dam Jacobsen tlf. 210101, og Jákup Klein Olsen tlf. 220173

Umsóknir, ið skulu vera okkum í hendi innan 12. juli, skulu sendast til:

Spf. Nordbil
Oyggjarvegur
Postboks 1070
FO-110 Tórshavn
Tlf. 36 37 38



TEAM85

# BRÚKIÐ MIÐLAHÚSIÐ



Ring og hoyr nærri

- Konsertir
- Fundir
- Framsýningar og annað

miðlahúsið í Vágsbotni

TÓRSGØTA 1 · TEL 341800 · FAX 341801
POST@SOSIALURIN.FO · WWW. SOSIALURIN.FO
Sosialurin